

# Sjarman má ikki hvørva úr fótbóltinum

**Petur Reinert, fótbóltsdómari metir ikki, at videomyndir skulu yvirtaka leiklutin hjá dómaranum. Hinvegin kunnu videomyndir vera hentar, tá hendingar sum stútingin hjá Zidane skulu staðfestast og revsast**

*Theodor E. D. Olsen*
*Fótbóltur*

Eftir HM-finaluna í gjárkvøldið var franski landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, skjótur at siga, at hetta var fyrstu ferð at videomyndir vórðu brúktar eftir eina útvísing. Hann sipaði sjálvandi til tilburðin, tá Zinedine Zidane fekk reyða kortið eftir at hava stútað ein italiumann í bringuna.

Altjóða fótbóltssambandið FIFA hava tó almannakunngjørt, at videomyndir ikki vóru orsøk til avgerðina at visa Zidane av vøllinum. FIFA upplýsir, at 4. dómarin, sum situr uttan fyri vøllin, sá hendingina og boðaði høvuðsdómaranum frá hesum.

Júst hendan keðiliga hendingin í finaluni kundi sett gongd aftur á kjakið, um videoeftirlit skal avgera í framtíðini, um fríspark, brotsspark ella eitt reytt kort skal gevast.

Petur Reinert er fótbóltsdóamri í Føroyum, og hann er sannførdur um, at øll sjarman hevði horvið úr fótbóltsspælinum, um videoeftirlit skuldi avgjørt staklutirnar. Hann nevnir hendingar sum tá Maradona skoraði við hondini í 1986 og finaluna í 1966, har fólk enn kjakast um, bólturin rakk inn um málstrikuna.

Petur Reinert heldur, at hóast dómararnir sjálvandi skulu vera nærlagdir og gera sítt allarbesta, so skal pláss vera fyri menniskjaligum mistøkum, tí annars verður als ikki neyðugt at hava dómarar yvirhøvur, tí so kundi kundu vit ístaðin bara havt fólk, sum duga fótbóltslógirnar og mett út frá myndunum á skíggjanum, og tað heldur Petur Reinert ikki at vera nakra gongda leið.

Hinvegin heldur hann at videomyndir kunnu vera hentar í førum sum tí hjá Zidane í HM-finaluni, tí hann metir ikki at fótbóltsspælarar skulu sleppa órevsaðir frá tilíkum, um talan t.d. var um eina hálvfinalu, og dómararnir einki høvdu sæð.

Petur Reinert leggur afturat, at hetta eisini átti at verið galdandi her á landi, tí tað hevði sent eitt signal út til spælararnar, at ikki alt verður góðtikið.

## FAKTA

Zinedane Zidane hevur 12 reyð kort.
3 í Bordeaux
5 í Juventus
2 í Real Madrid
2 á franska landsliðnum




Vónbrotnir Zidane-fjepparar:

# Vit fyrigeva Zidane

**11 ára gomlu Jan Pauli og Símun hava seinastu nógvu árini verið stórir fjepparar hjá Zidane. Og hóast Zidan bæði skallaði Materazzi og fekk reytt kort í HM finaluni í gjár, hava teir ikki mist nakað fyri stóru fyrimyndini.**

ÍTRÓTTUR

*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

- Vit høvdu báðir viljað verið Zidane. Hann er ein sera, sera góður fótbóltsspælari. Men vit vóru tó illir og skuffaðir inn á hann í gjár, eru teir báðir samdir um.

- Eg haldi, Zidane á ein hátt sveik franska landsliðið, og tað hevði so avgjørt verið brúk fyri honum í brotssparkskappingini. Men eg kann gott fyrigeva honum allíkavæl. Hann varð óivað provokeraður av Materazzi, og so er tað synd í honum, at hann skal enda sína stóru fótbóltskarrieru soleiðis, heldur Jan Pauli, og Símun leggur afturat, at Zidane hevði ikki fyri neyðini at skalla Materazzi:

- Tað var nokkso býtt av honum, og tað visti hann eisini sjálvur alt fyri eitt, tí hann mótmælti ikki. Men sum sagt, so er hann framvegis ein stór stjørna hjá mær, sigur Símun at enda.